


www.oljan.fo

**Jan Müller** 25 - 02 - 2013

# ST ávarar ímóti oljuvinnu í Arktis

Stjórin fyri umhvørvisdeildini hjá ST sigur, at londini, sum umhugsa at fara undir oljuvinnu í Arktis, eiga at endurskoða sínar ætlanir og at hugsa gjølla um avleiðingarnar. -Vit síggja, at tað, at ísurin minkar, hevur elvt til kapping um júst tey evnini, sum hava gjørt, at ísurin minkar, sigur Achim Steiner. Hann vil hava øll lond til at hugsa sera gjølla um avleiðingarnar av kappingini um ta arktisku oljuna, tí at oljunýtslan ávirkar veðurlagið í hvørjum króki í heiminum, sigur hann. Vísindafólk siga, at tey hava ongantíð skrásett so lítið av havísi í Arktis sum í fjør. Sambært umhvørvisdeildini hjá ST, UNEP, var havísurin 18 prosent minni enn í 2007, tá tað var óvanliga lítil ísur. Tað stendur at lesa í einari frágreiðing, sum deildin legði fram á einum fundi í Kenya nú um dagarnar. Statoil er eitt av feløgunum, sum hava ætlanir um at fara undir oljuvinnu á nýggjum leiðum í Arktis. Shell hevur eisini slíkar ætlanir, men nú ljóðar, at tað er ivasamt, um felagið fer at fullføra ætlanirnar.